# Heilsanir



**Góða Elskaða Elisa**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum 24. okt.
Vit elska teg.
**Heilsan mamma og babba**



**Góða allarbesta mamma, vermamma og omma**
Hjartaliga tillukku við degnum 22. okt. Takk fyri alt tú ert fyri okkum. Vit elska teg! Alt tað besta ynskja vit tær,
**Familjan**



**Góða Elisa systur**
Tillukku við tínum 5 ára degi.
**Ynskja vit Páll Oddur, Hendrik, Thomas Hans og Marjun**



**Góði babba**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum :)
Takk fyri alt tú ert fyri meg. Eg elski teg.
**Heilsan Óluva**



**Til piparsveinin Jørgen Enghamar**
Her ert tú flottur sum altíð. Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum. Gleða okkum til í morgin.
**Heilsan vit øll**

---

## Prógv
Oddvá Nielsen úr Tórshavn hevur 19.10.10 lokið prógv sum matvøruverkfrøðingur á Københavns Universitet, Det Biovidenskabelige Fakultet (fyrrverandi KVL).

## Silvurbrúdleyp
Týsdagin 23. nov. hava Osla og Christian Andreasen, Mikladali, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Avhaldshúsinum í Mikladali leygardagin 20. nov. kl. 19. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá á tel.: 457049 ella 581865 áðrenn 5. nov.

## 90 ára føðingardagur
18. okt. *fylti* Alvilda Bærendsen, ættað úr Norðradali, 90 ár. Føðingardagurin verður hildin leygardagin 23. okt. kl. 11-16 á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin. Øll eru vælkomin.

## 85 ára føðingardagur
Sunnudagin 24. okt. verður Sigurd Johannesen, nevndur Sigurd á Brúgv, Vestmanna, 85 ár. Dagurin verður hildin sunnudagin 24. okt. frá kl. 15 heima hjá Sigurd og Hannu, á Bakkavegi 18, Vestmanna.

## 80 ára føðingardagur
21. okt. *fylti* Frithiof Petersen, Kollafjørður, 80 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum leygardagin 23. okt. frá kl. 12-18. Øll eru hjartaliga vælkomin

## 80 ára føðingardagur
28. okt. verður John Eystberg, Havn, 80 ár. Dagurin verður hildin heima leygardagin 30. okt. frá kl. 11 til 15. Øll eru vælkomin.

## 70 ára føðingardagur
Leygardagin 23. okt. fyllir Jósvein Hovgaard, í Porkeri, 70 ár. Føðingardagurin verður hildin hjá soninum Jan, á Hólinum 9, frá kl. 18. Øll eru vælkomin!

## 70 ára føðingardagur
Sunnudagin 24. okt. verður Paulina Hansen, Toftir, 70 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

## 70 ára føðingardagur
Hósdagin 4. nov. fyllir Tórjun Dahl Jacobsen, Fuglafjørður, 70 ár. Dagurin verður hildin heima leygardagin 6. nov. frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## 60 ára føðingardagur
Mánadagin 25. okt. fyllir Ruth Midjord, Hvalba, 60 ár. Dagurin verður hildin heima leygardagin 23. okt. frá kl. 12-17. Øll eru vælkomin.

## 60 ára føðingardagur
Mánadagin 1. nov. fyllir Gerhard Lognberg 60 ár. Dagurin verður hildin í Samljóð leygardagin 6. nov. kl. 19. Øll eru vælkomin.

## 50 ára føðingardagur
10. nov. fyllir Georg eystan Á 50 ár. Dagurin verður hildin 13. nov. kl. 19. Tey ið vilja við í gildi, verða biðin um, at boða frá, áðrenn 6. nov. á tel.: 272509.




Tín stóri dagur

Takka í Sosialinum







Leygardagin 23. okt. giftast Christina av Reyni, Tórshavn og Leif á Bøgarði, Kaldbak. Vígslan verður á Auto Service kl. 12 , eftir vígsluna eru øll vælkomin til brunch. Veitsla verður fyri innbodnum kl. 19.

Leygardagin 30. okt. kl. 18 giftast í Sandavágs kirkju Sólja Jóanisdóttir, Sandavágur, og Heini Hanusarson, Kollafjørður. Veitslan verður fyri innbodnum í SÍF-húsinum eftir vígsluna.

Leygardagin 30. okt. giftast Miki Lautrup Lund, DK og Jóna Astrid Lambastein, Fuglafjørður. Víglsan verður í Fuglafjarðar Kirkju kl. 16. Brúdleyp verður í Lonini í Fuglafirði fyri innbodnum.

Leygardagin 6. nov. kl. 16. giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík. Gudrun Bláskor Húsar og Jákup Samson Klaksvík. Vælkomst verður í Skálanum kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.



Leygardagin 13. nov. giftast Martha Isabella T. Thomassen og Birgir Lauritsen, Miðvágur. Vígslan verður í Miðvágs kirkju kl. 14. Opið hús verður í bygdarhúsinum í Miðvági frá kl. 19. Tey ið ynskja at heilsa uppá brúðarparið verða vinarliga biðin at siga frá áðrenn 23. okt. Martha tlf. 257329 - Birgir tlf. 269797, heima tlf. 332433 ella á teldupost: martha-birgir@hotmail.com



Leygardagin 4. des. giftast Jónvá E. Royðutoft, Strendur og Jónleif Eliasen, Tórshavn. Vígslan verður í Kelduni í Skálafirði kl. 13. Veitslan verður í bygdarhúsinum á Strondum kl. 18. Tey ið vilja gleða okkum við at koma, vera biðin, at siga frá innan 20. nov. á tel.: 747825-447825 (Jónvá) ella 591310 (Jónleif)